# Eisini Porkenningar hava áhuga

**Porkeris bygdaráð tekur undir við tankanum um at byggja ein skúladepil í Hovi og eitt røktarheim í Vági. Men bygdaráðið vil hava meiri at vita, áðrenn tað kann taka endaliga støðu**

SKÚLI OG RØKTARHEIM

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Eisini Porkenningar halda, at ætlanin hjá landsstýrinum at byggja ein skúladepil í Hovi og eitt røktarheim í Vági, er áhugaverd.

Løgtingið hevur samtykt at byggja miðnámsskúla í Vági. Samstundis hevur heilsuskúlin á Tvøroyri sera vánaligar umstøður.

Tí hevur landsstýrið skotið upp at byggja báðar skúlarnar saman í ein depil í Hovi fyri at fáa tvey fyri eitt og fyri at spara pening.

Fyri at stykkið, sum er grivið út til skúlan í Vági,



*Bygdaráðið í Porkeri tekur einmæltundir við tankanum um at byggjaein skúladepil í Hovi og røktarheim í Vági. Frá vinstru sita Sigmund Olsen, Gunnbjørn Petersen, Eli Frederiksen, borgarstjóri, Anna Djurhuus, varaborgarstjóri og Mikkjal Sørensen. Gunnbjørn Petersen hevur fyribils tikið sætið í bygdaráðnum fyri Hans Eli Bech, sum er sjukur.*

ikki skal fara fyri skeytið, skjýtur landsstýrið samstundis upp at byggja eitt røktarheim til 35 fólk á økinum. Av teimum 35 plássunum, skulu nøkur pláss gerast til fólk í barndømi við teimum serligu umstøðum, sum tað krevur.

Ætlanin hevur verið ógvuliga umstrídd, men landsstýrið hevur nú biðið kommunurnar taka eina prinsipiella støðu í málinum, so at landsstýrið kann fáa at vita, um hetta er nakað at arbeiða víðari við. Taka kommunurnar undir við uppskotinum, skal landsstýrið hava fund við tær í næsta mánaði, har ætlanin er at greiða nærri frá uppskotinum, áðrenn kommunurnar binda seg endaliga.

Í farnu viku hava bygdaráðini í Hvalba, í Hovi og í Sumba, viðgjørt ætlanina og tey taka øll undir við henni.

Týskvøldið varð málið so til viðgerðar í bygdaráðnum í Porkeri. Og eisini bygdaráðið í Porkeri tekur einmælt undir við uppskotinum.

Men bygdaráðið ger samstundis vart við, at sum málið er lýst í løtuni, veit tað alt ov lítið um ætlanina, til at tað kann taka eina endaliga støðu.

Eitt nú vil bygdaráðið hava meiri at vita um, hvørjari tíðarætlan, landsstýrið arbeiðir eftir, tvs, nær skúlin og røktarheimið verða liðugt.

Og bygdaráðið vil eisini hava at vita, hvussu verður við tí partinum av røktarheiminum, sum kommunurnar skulu fíggja og, hvussu nógv hetta kemur at kosta Porkeris Kommunu og hvørjar gjaldstreytirnar verða.

Onkur bygdaráðslimur hevði ikki álit á, at skúlin fer at verða bygdur í Hovi. Hildið varð, at verður hann ikki bygdur í Vági er tað við tí fyri eyga at lumpa hann á Tvøroyri.

Aðrir hildu kortini, at landsstýrið kann ikki leypa frá eini greiðari avtalu.

Og eisini í Porkeri vóru røddir frammi um, at tað í øllum førum var sera óheppið at byggja skúlan vesturi á Eiðinum í Vági, tí so verður neyðugt at koyra ígjøgnum alla bygdina og har eru vánaligar umstøður hjá ferðsluni.

Hevði skúlin av øllum ligið eystanfyri Vág, lá hann í øllum førum nógv betri fyri enn vesturi á Eiðinum, var tað bygdaráðslimur í Porkeri, sum helt.

# Flakavirkið í Vági er deytt og tí má tað seljast

**– Hóast virkið í Vági ikki verður brúkt, vilja Fiskavirking og Framtaksgrunnurin ikki selja tey og sostatt seta tey tær fríu marknaðarkreftirnar til viks, sigur Svenning Borg, formaður í havnanevndini í Vágs Býráð**

FISKIVINNA Í SUÐUROY

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað er ongin vegur uttanum. Tað stóra flakavirkið í Vági má loysast frá Føroya Fiskavirking

Tað sigur Svenning Borg, formaður í havnanevndini í Vágs Býráð.

Í Sosialinium herfyri førdi Hans Andrias Joensen, nevndarlimur í Framtaksgrunninum fram, at tað var hvørki Fiskavirking ella Framtaksgrunnurin, sum høvdu skyldina av vánaligu støðuni í Suðuroy.

Svenning Borg grundleggjandi ósamdur.

– Tað eru fyrst og fremst Fiskavirking og Framtaksgrunnurin, sum eru orsøkin til kreppuna í Syðru helvt í



*Tað slepst ikki uttanum, at virkið í Vági verður loyst frá Fiskavirking, sigur Svenning Borg, formaður í havnanevndini í Vágs Býráð*

Suðuroy.

Tað eru tey, tí tey hava havt tað stóravirkið í Vági stongt alla tíðina, sigur hann

– Fiskavirking og Framtaksgrunnurin hava lagt sína køvandi hond yvir syðru helvt í Suðuroy og tí hava tey alla nógv tað mestu skyldina.

### Tora ikki at selja

Hann vísir á, at støðan á flakavirkinum ávirkar alt annað lív í økinum.

– Tað eru so nógv fólk og so nógvar fyritøkur, sum støðan á flakavirkinum beinleiðis ávirkar. Er onki arbeiði á flakavirkinum, rakar tað eisini tær fyritøkur, hvørs virksemi er avleidd av flakavirkinum. Samstundis hava fólk minni pening um hendi og tá rakar handilslívið og tænastuvinnur annars og tað er nú komið hartil, at handlar eru á markinum til at stongja.

Hann spyr eisini, hvussu tað ber til, at Fiskavirking ikki vil selja virkið í Vági, tá ið tað ikki verður brúkt kortini.

Hann er komin til ta niðurstøðu, at Fiskavirking torir ikki at selja virkið í Vági fyri ikki at fáa ein kappingarneyta.

– Við at varðveitavirkið í Vági- og øll hini undir tí almenna, er Fiskavirking sostatt við til at seta marknaðarkreftirnar til viks.

Men er tað ikki í veruleikanum skilagott av Fiskavirking, tí Fiskavirking er ein vinnurekandi fyritøka?

– Fiskavirking er ein vinnurekandi fyritøka. Men eitt deytt virki er ein byrða fyri eina fyritøku og allar vinnurekandi fyritøkur vildu roynt at sloppið sær av við eina byrðu. Torir Fiskavirking ikki í kapping við aðrar, er okkurt sum haltar.

– Fiskavirking eigur at tola og at tora at virka undir vanligum kappingartreytum, sigur formaðurin í Havnarnevndini í Vágs Býráði.

### Hava brotið avtaluna

Svenning á Borg somuleiðis til avtaluna frá 21. desember í 1996 um at endurskipa Fiskavirking.

Har stendur, at flakavirkið í Vági skal vera eitt av flakavirkjunum, sum Framtaksgrunnurin skal føra víðari, saman við sjey øðrum navngivnum virkjum, sum eru: Flakavirkið á Tvøroyri, virkið í Havn, virkið á Toftum, virkið í Runavík, virkið á Eiði, virkið í Vestmanna og virkið í Miðvági.

Men tað stendur eisini í avtaluni, at hesi virkini skulu førast víðari í 3-5 ár, so skulu tey seljast áhugaðum keyparum!

– Hetta er ikki gjørt, hóast vit síðani tá hava havt størsta framburð á fiskivinnuni nakrantíð, bæði í fiskiskapi og í prísi.

Sostatt hevur Fiskavirking og Framtaksgrunnurin ikki hildið avtaluna frá 1996.

Ístaðin fyri at gera, sum avtalan áleggur teimum, hevur Fiskavirking tvey stór virki í Suðuroy.

– Virkið í Vági liggur heilt stilt og á virkinum á Tvøroyri verður bara ein partur av orkuni brúkt, so tað verður ikki nógvur fiskur arbeiddur á hesum báðum virkjunum.

Hinvegin vísur Svenning Borg á, at royndirnar vísa, at har ongi virki eru, fara fiskiloyvini eisini.